# TAKS herðir mannagongd viðv. tolling av vøru

*Frá 1. november 2020 skulu allar útflýggjaðar vørur, verða tollavgreiddar í seinasta lagi 14 dagar aftaná at vøran kom til landið. TAKS hevur boðað flutningsfeløgunum, at tey frá 1. november seta eina null-toleransu í verk, tá tá snýr seg um tolling av vøru. Hetta merkir, at hvør einstøk eftirstøða hevur við sær eina sekt áljóðandi kr. 2.000,-.*

*Faroe Express mælir øllum kundum til at seta seg inn í rundskrivið frá TAKS*

Faroe Express hevur tollkreditt, sum loyvir felagnum at útflýggja sendingar til kundar sínar alt fyri eitt. Nógv viðskiftafólk hava eisini tollkreditt av somu orsøk, tí tollkredittturin loyvir skjóta og effektiva avgreiðslu av flutningi.

Herðingin av mannagongdini viðvíkjandi tolling av vøru viðkemur okkum og kundum okkara í serliga hesum viðurskiftum:

- Vinnukundar, sum fáa vøru útflýggjaða uppá tollkredittin hjá Faroe Express, men tollavgreiða sjálvir. Hesir kundar mugu ansa eftir freistini á 14. dagar.

- Tá Faroe Express tollavgreiðir fyri kundar, mugu vit fáa røttu skjølini rættstundis, soleiðis at til ber at tollavgreiða innan 14 dagar frá komu.

Broytingin hevur onga ávirkan á tær sendingar, sum ikki eru útflýggjaðar og tískil enn eru á goymslu hjá Faroe Express.

## Herda mannagongdin krevur røtt skjøl

Herda mannagongdin hevur við sær eitt økt trýst um at røtt skjøl fylgja við sendingum. Krøvini um skjalfesting í sambandi við tolling eru rættiliga orkukrevjandi sum er. Størstu avbjóðingarnar koma tó, tá røttu skjølini til eina sending ikki eru tøk.

Hetta hevur við sær, at Faroe Express við hesum vil boða øllum viðskiftafólki frá, at um sendingar ikki kunnu tollavgreiðast innan 14 dagar, tí røttu skjølini ikki eru tøk, so vil felagið tilskila sær rættin at senda eina møguliga sekt víðari til kundan.

Somuleiðis tilskila vit okkum rættin at senda eina møguliga sekt víðari til kundan, um kundin ikki hevur tollavgreitt sínar sendingar, áðrenn 14 dagar eru farnir. Um hetta ikki røkkur á mál, so má vøran tollavgreiðast áðrenn, hon verður útflýggjað.

Um viðskiftafólk hava spurningar viðvíkjandi innihaldinum í hesum skrivi og broyttu mannagongdina hjá TAKS hjálpa vit fegin. Rundskrivið frá TAKS kann lesast her

Vinarliga

Faroe Express

FAROE EXPRESS / Eystara Bryggja / FO-100 Tórshavn / Tel. +298 34 90 90 / express@faroeexpress.fo